G! Festivalurin:

# Tú mást fara!

Soleiðis sigur Jóhan í Kollafirði í lýsingini fyri G! Festivalin. G! byrjaði í 2002 og er vaksið hvørt ár. Nógv viljað vera við, at G! er feitasta summartiltak í Føroyum, og eingin ivi er um, at tað eru nógv, sum gleða seg til festivalin.

G! Festivalurin setti veruliga gongd í nakað hjá føroyingum, og tey síðstu árini eru tónleikafestivalarnir og tónleikatiltøkini vorðin alsamt fleiri. G! er mestsum ein tónleikahátíð, har folk kunnu hoyra føroyskar tónleikarar, útisetar og útlendsk nøvn. Hvørt ár hevur G! borðreitt við onkrum stórum altjóða nøvnum, sum skulu draga fólkini til. Í ár er einki undantak. Kendasti bólkurin av teimum, sum higartil eru almannakunngjørdir, er helst danski bólkurin Outlandish.

Tann 20.–22. verða veitsludagar á sandunum í Syðrugøtu, tí at tá verður Føroya størsti og feitasti festivalur!






















